## 1 Keyp í flogfarinum




Ein familja var á Mallorka og ferðaðist í summar.

Um borð á flogfarinum keyptu tey:

| | | |
|---|---|---|
| 4 Toblerone | 25 | kr fyri hvørt |
| Belgisk luksuskonfekt | 130 | kr |
| 2 Fossil ur | 495 | kr fyri hvørja |
| Barberspritt | 250 | kr |
| Bodylotion | 160 | kr |
| 2 pakkar av gummibamsum | 20 | kr fyri hvønn |

**a** Hvussu nógv skuldu tey gjalda?

Sama barbersprittið kostar 310 kr í Føroyum.

**b** Hvussu nógv prosent var tað bíligari at keypa barbersprittið í flogfarinum?

Bodylotionið var 20% bíligari í flogfarinum enn í Føroyum.

**c** Hvussu nógv kostar Bodylotionið í Føroyum?

## 2 Teinur og tíð

Tey flugu beinleiðis úr Føroyum til Mallorka.

Teinurin úr Føroyum til Mallorka er 2695 km, og miðalferðin hjá flogfarinum er 770 km/t.

**a** Hvussu langa tíð tók tað at flúgva teinin?




Flogfarið brennur í miðal 2600 litrar av brennievni um tíman.

**b** Hvussu nógvar litrar av brennievni brennur flogfarið úr Føroyum til Mallorka?

Á ferðini úr Føroym millumlendi flogfarið í Glasgow. Ferðin úr Føroyum til Glasgow vardi í 48 minuttir.

**c** Hvussu langt er úr Føroyum til Glasgow?

## 3 Evrur

Á Mallorka brúka tey gjaldoyrað *Evru*. Kursurin á evruni var 743,56.

Tey høvdu Visa-kort við sær á ferðini. Tey kundu veksla í gjaldoyrasjálvtøkum, men kundu bara veksla í mesta lagi fyri 2000 kr um dagin.

**a** Hvussu nógvar evrur kundu tey í mesta lagi fáa um dagin (minsti mynturin í hesum sjálvtøkum er 20 evrur)?

Tá ið tey komu heimaftur, høvdu tey 150 evrur við sær, og tær vekslaðu tey til føroyskar krónur.

**b** Hvussu nógvar krónur fingu tey fyri evrurnar?

## 4 Svimjihylurin




Ein svimjihylur hevur mátini, tú sært á tekningini omanfyri.

**a** Hvussu nógvar longdir skalt tú svimja, fyri at hava svomið 100 m?

**b** Hvussu nógv vatn er í hylinum, tá ið tað stendur 10 cm frá tromini?

## 5 Krossskipanin

Tríggjar linjur *l*, *m* og *n* hava hesar forskriftir:

*l*: $y = x - 3$
*m*: $y = -2x + 2$
*n*: $y = 6$




**a** Tekna linjurnar *l*, *m* og *n* í somu krossskipan.

Linjan *l* sker x-ásin í punktinum A.
Linjan *m* sker x-ásin í punktinum D.
Linjurnar *l* og *n* skera hvør aðra í punktinum B.
Linjurnar *m* og *n* skera hvør aðra í punktinum C.

**b** Rokna víddina á ferhyrninginum ABCD.

**c** Rokna longdina á linjustykkinum AB.

Ein onnur linja *k* gongur ígjøgnum $(-6,-1)$ og stendur vinkulrøtt á *m*.

**d** Hvør er forskriftin hjá linjuni *k*?

## 6 Handbóltskappingin

**a** Hvussu stórur var prosentparturin hjá Stjørnuni kappingaárið 2002/2003?

**b** Hvussu nógv lið hevði Eiðis Bóltfelag (EB) við í kappingini í 2003/2004?

**c** Ger eina farmynd, sum vísir prosentbýtið í 2003/2004.

**Handbóltskappingin**

| Kappingarárið 2002/2003 | | | Kappingarárið 2003/2004 | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Feløg** | **Tilmeldað lið** | | **Feløg** | **Tilmeldað lið** | |
| | | | EB | | 3,6% |
| H 71 | 17 | 9,7% | H 71 | 12 | 7,1% |
| KÍF | 8 | 4,6% | KÍF | 8 | 4,7% |
| Kyndil | 21 | 12,0% | Kyndil | 18 | 10,7% |
| Neistin | 33 | 18,9% | Neistin | 34 | 20,1% |
| SÍF/Sóljan | 10 | 5,7% | SÍF/Søljan | 8 | 4,7% |
| StÍF | 20 | 11,4% | StÍF | 20 | 11,8% |
| Stjørnan | 16 | | Stjørnan | 15 | 8,9% |
| TB | 4 | 2,3% | TB | 4 | 2,4% |
| Tjaldur | 18 | 10,3% | Tjaldur | 18 | 10,7% |
| VB | 10 | 5,7% | VB | 8 | 4,7% |
| VÍF | 18 | 10,3% | VÍF | 18 | 10,7% |
| Tilsamans | **175** | | | **169** | |

**d** Hvat var miðaltalið av tilmeldingunum 2002/2003.